

# FRØÐI

1/2001 7 árg. kr. 48,00

Spurningur hjá skordýrafrøðingum:

## Verða vespurnar verandi?

Vatnið í Føroyum

Skriðulop og veðurlag

Bókmentasøguskriving

Offur ella snultari? - Føroyar í kalda krígnum

FRØÐI • 1/2001



## Vespur 4

Heystið 1999 og summarið 2000 hava nógvar vespur verið at síggja í Tórshavn, og summar hava enntá havt vetursetu her. Enn ber ikki til at siga, hvussu vespurnar fara at klára seg her. Bert framtíðin kann vísa, um tær møguliga fara at hava árin á tann villa djóraheimin her. Jens-Kjeld Jensen, Dorete Bloch, Føroya Náttúrugripasavn



## Offur ella snultari? — Føroyar í kalda krígnum 8

Síðan Svartabók kom út, hevur almenna kjakið um leiklut Føroya í kalda krígnum verið heldur eintáttað. Serstakliga hevur verið ført fram, at donsku myndugleikarnir nýttu Føroyar sum ein trumf, eisini kallaðan 'føroyakortið', í samráðingum við NATO og/ella USA fyri at sleppa bíligari á hernaðarøkinum. Sámal Tróndur Finnsson Johansen, Føroya Landsskjalasavn



## Vatnið í Føroyum 15

Hvat er í vatninum, sum vit drekka? Fiskivinnuroyndir hava fíggjað eina verkætlan, sum hevur givið okkum størri kunnleika um, hvat ið er í einum glasi við vatni. Rikke Berg Larsen, Heilsufrøðiliga starvsstovan



## Skriðulop og veðurlag 18

"Áarførið minti um verðsins enda", skrivaði eitt av bløðunum um støðuna í Oyndarfirði eftir grimdarregnið tann 18. september 2000, tá ið hundraðtals skriður lupu í Norðuroyggjum, Eysturoynni og Streymoynni. Hví vóru skriðulopini so mong og stór? Lis Mortensen, Jarðfrøðisavnið



## Agenda 21: Hugsið alheimsliga - virkið heimliga 24

Í 1992 hittust 180 ST-lond í Rio de Janeiro fyri at kjakast um, hvussu vit best loysa alheimstrupulleikarnar, sum nú leika á. Tað, sum spurdist burtur úr menningar- og umhvørvisráðstevnuni í Rio, var tann sonevndi Agenda 21-sáttmálin — ein dagsskrá fyri, hvussu vit í 21. øld fáa eina burðardygga menning. Barbara Samuelsen, Heilsufrøðiliga starvsstovan



## Um skriðulop á landgrunshellingini 30

Tey merkisverdastu havbotnssniðini í djúphavinum koma í, tá ið legugrýtið á landgrunninum og hellingini av ymsum orsøkum losnar úr legu og fer á glið oman eftir hellingini. Hetta kann geva óstøðugleika á landgrunshellingunum. Áhugin fyri slíkum skriðum er stórur bæði hjá vísindum og ídnaði. Birger Larsen, Tove Nielsen og Antoon Kuipers, Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelse (GEUS)



## Bókmentasøgukriving 35

Bókmentasøga kannar menningina hjá bókmentum gjøgnum longri og styttri tíðarskeið. Í hesi grein verður sagt frá fyribrigdinum bókmentasøga og frá føroyskari bókmentasøguskriving og fortreytum hennara. Turið Sigurðardóttir, Føroyamálsdeildin




## Havið. Bókarummæli 46

Í fjør kom bókin Havið eftir Boga Hansen út. Bókin er sera væl hóskilig at brúka í frálæruni á flest øllum skúlum í fiskivinnulæru, og á sjómansskúlunum kann hon somuleiðis verða brúkt í frálæru um veður- og havlæru. Eyðsæð er, at bókin er ein fongur. Ólavur á Heygum, Heðin Hammer og Poul Magnussen ummæla

# Vespur

**Heystið 1999 og summarið 2000 hava nógvar vespur verið at síggja í Tórshavn, og summar hava enntá havt vetursetu her. Enn ber ikki til at siga, hvussu vespurnar fara at klára seg her. Bert framtíðin kann vísa, um tær møguliga fara at hava árin á tann villa djóraheimin her.**



*Vanlig vespa (P. vulgaris). Kallvespa á veg út úr einum kliva. (Mynd: Jens-Kjeld Jensen ©)*

*Vespubýli í moldini undir einum træstubba í Havn, heystið 2000. (Mynd: Jens-Kjeld Jensen ©)*




JENS-KJELD JENSEN



DORETE BLOCH
FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN


## ALMENT UM VESPUR

Vespur, meyrur og býflugur hoyra allar til hópin *Hymenoptera;* í hesum hópi eru fleiri enn 100.000 sløg um heimin allan. Eyðkennið fyri Hymenoptera er, at hesi skordýr hava fýra glærar veingir mótsett eitt nú flugum og grindalokkum, sum hava tvær.

## FELAGSLIGAR VESPUR

Tær vespur, ið her skulu umrøðast, eru felagsligu vespurnar *(Vespidae)*, ein ætt, sum telur 7 sløg í grannalondum okkara. Eyðkenni teirra er, at tær halda til í 1-árs sambýlum, sum ein víggjuføR kvennvespa (drotning) setur á stovn hvørt vár. Drotningin fer undir at byggja eitt vespubýli av gráum pappírsevni, sum hon ger við at tyggja træ. Tíðliga um várið fer drotningin at víggja, og tað heldur hon á við alt summarið. Víggið verður til ormverur, sum allar liggja hvør í sínum lítla sekshyrnta kliva. Tá ið ormveran fyllir allan klivan, verða tær til reivverur og klekjast til arbeiðsvespur. Tær eru allar kvennvespur, og tær eru minni enn drotningin. Arbeiðsvespurnar eru neyðarskapningar, sum eru smáir og stervnir, tí ov trongt er í ormveruklivanum. Allar hesar arbeiðsvespurnar hjálpa til við at røkja hinar ormverurnar, leita eftir føði og vaksa um vespubýlið.



*Týsk vespa (arbeiðsvespa). Paravespula germanica (Mynd: Jens-Kjeld Jensen ©)*

Seint út á summarið gera arbeiðsvespurnar nakrar serliga stórar klivar, og verða kallvespurnar og næsta árs drotningar uppføddar her, og tær fáa allar ríviligt at eta og hava gott pláss. Drotningin kann sjálv gera av, um víggið undan henni er troðið ella ei. Troðið víggj verður til kvennvespur, t.e. arbeiðsvespur ella drotningar. Ótroðið víggj verður harafturímóti



*Høvdið á eini vanligari arbeiðsvespu (P. vulgaris). (Mynd: Jens-Kjeld Jensen ©)*



*Høvdið á eini týskari arbeiðsvespu (Paravespula germanica). (Mynd: Jens-Kjeld Jensen ©)*



*Vanlig vespuormvera. (Mynd: Jens-Kjeld Jensen ©)*



*Lítil partur av vespubýli (P. vulgaris) við klivum og ein kallvespa í Havn heystið 2000. (Mynd: Jens-Kjeld Jensen ©)*

til kallvespur, sum tískil bert hava helvtina so nógv kromosom í kyknunum sum kvennvespurnar. Kallvespurnar makast við tær nýggju drotningarnar og doyggja síðan, og tær víggjuføru drotningarnar finna sær eitt gott skjól fyri veturin. Várið eftir er drotningin búgvin at fara undir eitt nýtt býli. Kallvespurnar hava ongan brodd, men bæði arbeiðsvespur og kvennvespur kunnu stinga.

Sostatt: Ein víggjuføer drotning hevur vetursetu. Í juni/julimánaði fer hon undir at byggja eitt vespubýli, og allar tær fyrstu arbeiðsvespurnar hava úr at gera við at finna føði til ormverurnar. Seinast í julimánaði og fyrst í august eru allar ormverurnar vorðnar til reivverur, eisini tær nýggju drotningarnar, sum skulu taka við árið eftir. Tískil hava arbeiðsvespurnar nú einki at taka sær fyri, og tær fara nú at leita sær inn í húsini eitt nú eftir onkrum søtum, og fyrstani tá fáa fólk ampa av teimum.

## VESPUR Í TÓRSHAVN

Leingi hevur verið rættiliga vanligt at finna einstakar vespur, men heil vespubýli hevur eingin rakt við fyrr enn í 1999. Áður kunnu tær vera komnar higar í eskjum við frukt og søtmeti, og tær vórðu júst funnar í handlum, sum høvdu fingið vørur úr útlondum.

Heystið 1999 vórðu rættliga nógvar vespur funnar í Havn og serstakliga uppi við Tórsvøll og Norðurlandahúsið. Vespurnar vóru bæði tann týska vespan *Paravespula germanica* og tann vanliga vespan *Paravespula vulgaris* (vespa), men einki vespubýli varð funnið í 1999. Heystið 2000 vórðu funnin 4 vespubýli í miðbýnum – og allar vóru tann vanliga vespan, og hugsandi er, at har hava verið 8-10 vespubýli til samans.

Vespubýli kunnu vera sera ymisk í støðd og skapi, alt eftir hvar ið tey eru bygd. Í heitari londum, har ið býlið ikki doyr út um veturin, hava tey rakt við vespubýli við fleiri drotningum og upp í 25.000 arbeiðsvespum. Men hjá okkum verður helst ein drotning í hvørjum býli, og um heystið úr nøkrum fáum hundrað upp í 2.-3.000 arbeiðsvespur. Tey kunnu so bera ímillum 0-500 drotningar og 0-500 kallvespur til samans. Helst verða tað ikki nógvar drotningar, sum liva veturin, og væntandi er, at bert 0-5 % kunnu hóra undan!





*Mynd til vinstru: Vespubýli undir takskeggi á húsum í Havn heystið 2000. (Mynd: Jens-Kjeld Jensen ©)*

*Mynd til høgru: Vespubýli aftan fyri blómurnar í einum grótgarði í Havn heystið 2000. (Mynd: Jens-Kjeld Jensen ©)*

## VANSAR OG FYRIMUNIR VIÐ VESPUM

Vespur kunnu stinga, og tær kunnu bera sjúkur. Tað kann ganga soleiðis fyri seg, at tær eitt nú fyrst seta seg á hundaskarn fyri at taka skordýr og síðan flúgva inn í handlar, har ið tær eta av vørunum. Vespur kunnu eta bæði køkur, rátt kjøt og fisk! Vespur kunnu eisini ampa tann villa djóraheimin við at eta ormverur og vaksin gagnskordýr av øðrum slag, sum t.d. blómuflugur og ormverur teirra.

Tær vaksnu vespurnar liva mest av blómuhunangi, nektari, og tær hjálpa soleiðis til við at dusta planturnar. Hjá okkum kunnu vespur fáa týdning við at dusta innfluttar urtagarðsplantur og -runnar, tí at vespurnar eru størri og sterkari enn tær føroysku blómuflugurnar. Vespuormverur liva harafturímóti av djóraføði, sum t.d. blaðlúsum og flugum. Tað kann henda seg, at vespur kunnu flyta upp ímóti 5000 flugur um dagin til eitt vespubýli í vanligari støðd. Vespur kunnu soleiðis gera stórt gagn við at taka burtur eitt nú blaðlýs úr urtagørðum og av urtapottum.

## VESPUR Í ÍSLANDI, HETLANDI OG ORKNOYGGJUM

***Ísland:*** Í 1973 vórðu í Reykjavík á fysta sinni funnin býli helst hjá týsku vespuni, og í 1978 varð fyrsta býlið hjá vanligu vespuni funnið. Nú hevur vanliga vespan breitt seg um alt Ísland, og í Reykjavík áttu í ár 2000 fýra ymisk sløg av felagsligum vespum, nevniliga sløgini *Paravespula germanica, P. vulgaris, Dolichovespula norwegica og Vespula rufa.* (Heimildarm.: Erlingur Ólafsson, Náttúrufræðistofnun, Reykjavík).

***Hetland:*** Í 1989 funnu fólk eitt vespubýli í útjaðaranum á Lerwick. Tað varð týnt, og nústani í 1993 sást aftur eitt býli hjá teirri vanligu vespuni í Lerwick. Tað varð eisini týnt, men kortini vórðu í 1994 funnin 18 vespubýli í Lerwick umframt eitt 8 km haðani í Scalloway. Í 1995 vórðu 40 vespubýli funnin í Lerwick. Sjálvt um Environmental Services Dept. of the Shetland Islands Council týndi øll vespubýlini, sum boð vórðu givin um, eru enn vespur í Hetlandi.

***Orknoyggjar:*** Í 1986 settu vespur búgv har.

Líkt er til at okkara vespur stava frá nøkrum drotningum, sum onkursvegna eru fluttar higar, men tað er kortini ikki óhugsandi, at tær kunnu vera komnar av sær sjálvum higar úr Hetlandi, men um tær finna so góðan trivnað her sum í Íslandi, kann bert framtíðin vísa.



*Innan í vespubýli (Mynd: Jens-Kjeld Jensen ©)*


### DORETE BLOCH

tók náttúruvísindaligt embætisprógv í djórafrøði við serligum atliti at vistfrøði antarfuglanna í 1970 við Aarhus Universitet. Hon gjørdist fyristøðari á Djóradeildini á Náttúrugripasavninum í 1980 og stjóri á Náttúrugripasavninum í 1997. Í 1994 fekk hon doktaraheitið fil.dr. í djóravistfrøði við grindahvalum sum evni við Lunds Universitet. Dorete hevur harumframt síðan 1974 verið lektari í lívfrøði á Fróðskaparsetri Føroya.
Teldupostur: doreteb@ngs.fo

### JENS-KJELD JENSEN

er útlærdur fuglaútstappari. Hann er sjálvlærdur fugla- og flogkyktafrøðingur (ornitologur og entomologur).
Hann hevur partvís starvað á Føroya Nátturugripasavni síðan 1994.
Teldupostur: jkjensen@post.olivant.fo